**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi viðv. hesum feløgum:**

**Nevnd og stjórn er farin frá.**
**Feløgini eru send Føroya Skiftirætti til tvingsilsavtøku 12. oktober 2001 eftir § 87, jvb. § 86 í Sp/-lógini og § 117 jvb. § 118 í P/F-lógini.**

Skrásetingar-nr. Sp/f 296, Sp/f Vestís undir tvingsilsavtøku, 380 Sørvágur.
Skrásetingar-nr. Sp/f 551, Sp/f Fok undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 674, Sp/f Tónar undir tvingsilsavtøku, 600 Saltangará.
Skrásetingar-nr. Sp/f 740, Sp/f Klaksvíkar Radiohandil undir tvingsilsavtøku, 700 Klaksvík.
Skrásetingar-nr. Sp/f 1662, Sp/f D. Brockie undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 1987, Sp/f Hjá Mariu undir tvingsilsavtøku,700 Klaksvík.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2210, Sp/f Runavíkar Skipshandil undir tvingsilsavtøku, 620 Runavík.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2490, Sp/f Hespan undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2542, Sp/f Lág undir tvingsilsavtøku, 900 Vágur.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2561, Sp/f 21/9-1994 undir tvingsilsavtøku, 600 Saltangará.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2585, Sp/f Atlantic Partnes undir tvingsilsavtøku, 370 Miðvágur.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2721, Sp/f Viking Fisk undir tvingsilsavtøku,530 Fuglafjarðar.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2804, Sp/f Blómukjallarin hjá Petur á Hædd undir tvingsilsavtøku,700 Klaksvík.
Skrásetingar-nr. P/F 2807, P/F Ting Form undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2811, Sp/f Krúnan Invest undir tvingsilsavtøku, 370 Miðvágur.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2821, Sp/f KT-Tænastan undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2889, Sp/f Interact undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2891, Sp/f Savi undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2892, Sp/f Mai undir tvingsilsavtøku, 900 Vágur.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2893, Sp/f 19. Juli 1999 undir tvingsilsavtøku, 620 Runavík.
Skrásetingar-nr. P/F 2908, P/F frá 10/9-1999 undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2918, Sp/f O.J. Rasmussen undir tvingsilsavtøku, 620 Runavík.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2922, Sp/f Skósmiðjan í SMS undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2960, Sp/f Millennium undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2983, Sp/f Fagralíð undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2992, Sp/f Allcom undir tvingsilsavtøku,700 Klaksvík.
Skrásetingar-nr. Sp/f 3010, Sp/f KT-Centrum undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 12. oktober 2001

Kristin Balle


**Nýggjar TANNPROTESUR**

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

## Fólk til fotodeildina

Vit sóknast eftur einum "labbisti" til fotodeild okkara at byrja sum skjótast. Tú kemur at arbeiða á okkara fotolaboratorii og taka tær av øllum myndaarbeiði. Framkallan av myndum. Brenna myndir á fløgur. Gera myndir klárar til internetið.



Tú verður upplærd/ur hjá okkum og hevur tú kunnleika til fotoarbeiði og telduførleika, er tað ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum dynamiskum liði.Umframt fotodeild hevur 3-arin eina fløgudeild, eina deild við urum og prýðislutum og eina sokallaða playstation deild. Tilsamans starvast uml. 12 fólk í 3-aranum.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Gissur, tel 353534.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

3arin

*att. Gissur Patursson*
*SMS · Postboks 1057 · FO-110 Tórshavn*

**veng-føroyar**



Plátulutir
Kúfangarir
Kølaragittar
Kølarir
Lyktir
Síðuspegl
Beriarmar
Bensintangar

Veng Føroyar
Fo-335 Leynar

Betri enn 15.000 ymiskar vørur til flest allar bilar heilsøla sum smásøla - eitt gótt tænasta og lágir prísir!

Telefon 42 17 67 Telefax 42 17 68 veng@post.olivant.fo

***Uppsetan og skipan av barrum***

***Til:***
***Brúdleyp***
***Rundar føðingardagar***
***Starvsfólkaveitslur***
***Ársveitslur***
***Reseptiónir***
***og tilíkt***



***Hans á Lag Sp/f***
***Tlf. 21 93 83***
***hanslag@post.olivant.fo***

Sosialurin 311820

## Jóla sølustevna

**verður á Giljanesi 24.-25. november.**

Teir handlar, fyritøkur og onnur, sum ætla at vera við, verða biðin um at siga frá skjótast gjørligt á telefon 333050 ella 211072.

**Miðvágs Róðrarfelag**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Økispedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir økispedagogi.

Dagrøktarskipanin í Tórshavnar kommunu er normerað til 300 børn, og umleið 65 dagrøktarar starvast í skipanini.

**Arbeiðið fevnir m.a. um**
- vegleiðing av dagrøktarmammum
- at skipa fyri ymiskum tiltøkum
- foreldrasamstarv.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Vit ynskja**
at tú hevur royndir innan dagstovnaøkið, arbeiðir sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 16. nov. 2001 ella eftir nærri avtalu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri í 11./13. lønarflokki

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, dagrøktarleiðara, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5.november 2001.

SNARSKIVAN

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

RO BETO GSGG v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820


**www.sosialurin.fo**


# ítróttur

Nr. 199 • týsdagur • 16. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# Allan Simonsen takkar fyri seg

**FSF er næstan í somu støðu, sum teir vóru í fyri átta árum síðani, áðrenn Allan Simonsen tók ábyrgdina á seg**

LANDSLIÐSVENJARI
*Jákup Mørk*

Í gjár var tað greitt, sum hevur verið alt meiri sannlíkt seinastu dagarnar. Allan Simonsen hevur boðað Fótbóltssambandinum frá, at hann er ikki sinnaður at halda fram í venjarasessinum, sum hann hevur sitið í seinastu átta árini. Fyrrapartin fríggjadagin skipar FSF fyri samkomu, har Allan Simonsen fer at siga farvæl við føroyingar og føroyskan fótbólt.

– At Allan Simonsen nú ynskir at royna nýggjar leiðir, kemur ikki óvæntað á okkum. Vit skilja hann væl og ynskja honum alt tað besta, sigur Jens Erik Magnussen, formaður í landsliðsnevndini.

Jens Erik Magnussen ásannar samstundis, at teir eftir øllum at døma ikki fara at kunngera navnið á nýggja venjaranum fríggjadagin ella fyrstu vikurnar.

– Tað er ikki neyðugt hjá okkum at koma við nakrari panikkloysn. Í løtuni vita vit ikki hvør verður venjari. Vit kanna marknaðin í løtuni, og vit taka okkum neyðugu tíðina. Tað hevur týdning, at vit so skjótt, sum tað ber til, fáa ein ábyrgdarmann, men tað er ikki alneyðugt, at vit skunda okkum óneyðuga nógv. Ongar landsliðsuppgávur verða á skránni hesu megin ársskiftið, sigur Jens Erik Magnussen.



*Hetta er betri, enn tað hevði verið, um tað seinni hevði verið neyðugt, at samstarvið helt uppat upp á ein keðiligan máta, sigur Allan Simonsen, nú hann hevur gjørt av at steðga sum landsliðsvenjari*

## Føroysk loysn

Møguleikin hevur verið nevndur, at ein føroyingur kann taka við starvinum. Mest upplagda boðið hevði verið Jógvan Martin Olsen, sum hevur verið næsti maður hjá Allani Simonsen seinastu seks árini. Men hann hevur gjørt avtalu við NSÍ.

Jens Erik Magnussen sigur, at teir hava tosað við føroyskar venjarar um landsliðsstarvið, men hann vil ikki siga við hvørjar. Um teir hava tosað við mest upplagda boðið, so hevur Jógvan Martin Olsen eftir øllum at døma borið seg undan.

## Ikki sum at siga tað

Jens Erik Magnussen sigur, at teir hava tosað við útlendskar venjarar, men teir hava ikki havt beinleiðis samráðingar við nakran.

– Vit royna í løtuni at finna fram til, hvat vit vilja hava. Hetta hevur fleiri síður. Ein er tann fíggjarliga. Um vit vilja hava ein kendan útlendskan venjara, sum er í fulltíðarstarvi hjá okkum, og sum stóran part av árinum býr í Føroyum, so skulu vit rinda so nógv meiri, enn vit hava gjørt higartil.

Sambært roknskapinum hjá FSF so hevur Allan Simonsen fingið eina lítla hálva millión um árið fyri at hava ábyrgdina av landsliðnum. Allan hevur ikki verið nógv í Føroyum. Hann eigur eitt felag, sum fæst við klædnaframleiðslu, og hann hevur m. a. umboðað hetta felagið, meðan hann hevur verið landsliðsvenjari.

*Vilja tit hava ein venjara, sum skal búgva í Føroyum?*

– Tað veldst um nógv viðurskifti, eisini tey fíggjarligu. Vit halda, at tað er bæði positivt og ikki positivt, at venjarin býr í Føroyum. Men hetta mugu vit tosa um í nevndini og við tann ella teir, sum vit fara at samráðast við um venjarastarvið. Men tað er greitt, at um vit vilja hava ein toppvenjara úr útlandinum, og at hann skal búgva í Føroyum mest sum alla tíðina, so skulu vit væl longri niður í lumman, enn tað higartil hevur verið neyðugt at fara, staðfestir Jens Erik Magnussen.

## Íblásturin

Allan Simonsen og Fótbóltssambandið komu í samband við hvønn annan, tá lutur varð kastaður um, hvussu londini skuldu bólkast í EM undankappingini í 1994 og í 1995. Jens Erik Magnussen ringdi úr Manchester til Allan Simonsen, sum tá var venjari hjá Vejle. Allan var áhugaður í starvinum og kom fyrstu ferð til Føroya í februar 1994.

– Hann var góður íblástur. Vit vóru í úrslitaligum aldudali, og Allan var við til at lyfta okkum. Hann setti ikki krøv, men hann kom við nýggjum hugsanum, sum tað var lætt hjá okkum at taka undir við.

*Hvar hevur hann verið størsti íblásturin?*

– Hann vildi spæla framrættað, og tað hevur sæst aftur á øllum landsliðunum. Harafturat vórðu viðurskiftini kring landsliðið styrkt nógv. Tekniska manningin hevur riggað framúr væl. Vit hava gott fólk, og tað er einki at liggja omaná, at tað var Allan Simonsen, sum hevði royndirnar og kom við hugskotum um, hvussu hetta skuldi skipast, og hvussu viðurskiftini kring dystirnar skuldu fyriskipast.

– Allan hevur syrgt fyri, at viðurskiftini kring liðið og á liðnum eru meiri føst, og tað var eftir, at hann var komin við hugsanini um, at tað var neyðugt, at kappingarárið varð longt, at vit broyttu steypakappingina, sigur Jens Erik Magnussen.

## Tíðin búgvin

Allan Simonsen undirstrikar, at tað er ikki tí, at hann hevur gjørt sáttmála um annað starv, at hann hevur gjørt av at gevast í Føroyum:

– Tíðin er búgvin til, at landsliðið og eg fáa nýggjar avbjóðingar. Tað er betri at gevast, meðan leikur er góður. Hetta er betri, enn tað hevði verið, um tað seinni hevði verið neyðugt, at samstarvið helt uppat upp á ein keðiligan máta.

Inni í blaðnum siga hjálparvenjarin, ein fyrrverandi landsliðsspælari og liðformaður og ein núverandi landsliðsspælari og fyrrverandi liðformaður sína hugsan um tíðina við Allani Simonsen sum venjara.

Flogbólturin er byrjaður:

## TB og SÍ tykjast sera sterk